# Tað hevur mangan ver



*Ein av uppgávunum hjá Sigvardi er at krevja inn ferðapeningin frá teimum ferðandi. Ingi er altíð við uppá eitt prát*

Mynd: Høgni Thomsen

**- Másin er eitt gott skip, men er ikki hóskandi til krøvini í dag. Tað hevði ikki verið verri við einum nýggjum skipi, sigur stýrimaðurin umborð á Másanum, Sigvard Johannesen**

STRANDFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Másin:** Á vetrartíð er farleiðin um Fugloyarfjørð ikki tann besta, tí her er opið hav til nógvar síður. Vil heilt illa til, kann sjálvt ein stuttur túrur til Svínoyar gerast eitt serstakt upplivilsi.

Henda vakra mánadagin í farna mánaði – mánadagin 27. august, tá fólkaatkvøða var í bygdini – vístu veðurgudarnir seg kortini frá síni allarbestu síðu.

Sólin skein oman og niðan, og tað var at kalla slætt á sjónum. Hóast hesar góðu umstøðurnar, vóru ikki nógv ferðafólk við henda túrin.

Útlendsku ferðafólkini eru fækkað í tali, og nú eru tað bert tey sum hava einihvørji ørindi til Svínoyar ella Fugloyar sum leggja leiðina higar.

Í summar hava verið rættiliga nógv ferðafólk við, serliga úr Danmark, Týsklandi og Spanien. Tey flestu fara ikki í land, men taka bert vøkru rundferðina kring eystastu oyggjar okkara.

- Tey fara uppá at standa og fáa her nógvar vakrar myndir av oyggjunum. Sigla vit framvið Selnesi (norðast á Svínoynni, blðm.) og síggja kóp har, plaga vit at siga teimum frá.

- Hetta eru tey sera fegin um, tí so fáa tey eina eyka uppliving á ferðini, sigur Sigvard Johannesen, sum er ættaður úr Klaksvík.

Hann hevur siglt við Másanum síðani á ólavsøku í fjør.

> *Onkur serliga ringur túrur hevur verið, har tunnur hava rikist á dekkinum og ferðafólk í hópatali hava spýð sum havhestar*

## Brimpláss

Umborð á einum strandfaraskipið sum Másin eru settar upp mannagongdir fyri, hvat hvør einstakur av manningini skal gera undir einum túri.

Sigvard hevur eisini sína skipan at halda seg til:

Hansara uppgáva er í fyrstu syftu at kasta endan í land, tá lagt verður at landi. Tá tað er so gjørt, skal hann syrgja fyri at allur farmurin verður kemur í land á røttum plássi.

- Eg eisini syrgja fyri at ferðafólkini koma trygt í land og umborð.

- Vit sigla jú til brimpláss, og tí kunnu fólk ikki bara leypa avstað, tá tey halda tað vera best, sigur Sigvard.

Henda túrin, sum umboð fyri Sosialin vóru við, var ikki so nógvur farmur við: Postur, nøkur kartong av mjólk og okkurt annað sum fólk høvdu bílagt sær úr Klaksvík.

Vita teir, at nógvur farmur er til tær báðar eystastu oyggjar okkara tann næsta túrin, verður farið undir at fáa henda til høldar umborð so skjótt, sum lagt er aftur at landi í Hvannasundi.

- Á henda hátt kunnu vit verða klárir við hesum í góðari tíð, greiðir Sigvard frá.

### Norður um ella suður um oynna

Strandfaraskipið Másin byrjar túrin á Hvannasundi og leggur síðani leiðina til Svínoyar og Fugloyar og síðani aftur til Svínoyar á heimleiðini.

Hetta er jú opin farleið og setur tí síni krøv til ætt, streymviðurskifti og mannerering. Tað gongur nevniliga ikki altíð soleiðis sum ferðaætlanin sigur.

FAKTA

**Við Másanum í sløk 50 ár**

Strandfaraskipið Másin varð smíðaður í 1959 úr eik, furu og bók í Havn.

Hann kann taka 63 ferðandi um summarið og 46 um veturin.

Longdin er 15,9 metrar, breiddin 5 og dýpdin 2,2 metrar, og er sløk 39 BRT.

Høvuðsmotorurin er frá 1985 og gevur eina arbeiðsferð uppá 7,5 míl.